## EG MEINI TAÐ



*Niels Uni Dam skrivar:*

# Eg meini

»Tað er ikki lætt at vera syndari í Føroyum«. Hesi orð eigur ein vitjandi íslendingur. Hesin sat í bili sínum og bíðaði eftir einari ferju. Hann royndi at finna okkurt at lurta eftir í útvarpinum, men allar tríggjar rásir sendu andaligar sendingar.

Nei, tað er sanniliga ikki lætt at vera syndari í Føroyum. Eg gevi honum rætt í hesum. Eg eri stutt síðan fluttur heim aftur úr Danmark. Áðrenn eg flutti niður, var Útvarp Føroya einasta rásin. Her var einki at velja í; um eg ikki tímdi at lurta eftir Útvarp Føroya, noyddist eg at sløkkja. Men nú er hetta broytt - ella tað helt eg í øllum førum, tá eg flutti heim. Eg frøddist um, at eg nú kundi velja millum heilar tríggjar rásir.

Men gleðin var stokkut. Lindin er ein andalig rás, og sendir tí andaligt tilfar, tað er ikki nógv at siga um tað, um mær tørvar andaliga føði, so kann eg altíð skrúva yvir á 101 mhz.

Men hinar báðar rásirnar? Jú, tá eg fór av flogvøllinum var ein fín sending á ÚF, eg leitaði tí ikki víðari. Komin til Vestmanna byrjaði ein av hesum nýmótans kristnisendingunum á ÚF, og áðrenn eg varð sendur til heljar av einum kanska vælmeinandi trúboðara, skrúvaði eg yvir á Rás 2. Men sama skil, aftur ein trúboðari sum greiddi frá um Jesus. Sostatt stóð eg í somu støðu sum fyrrnevndi íslendingur, tríggjar rásir, og ein tríeinigheit.

Eg hugsaði: »Hatta var forbiðið snedigt, men hetta er nokk bara eitt undantak”«. Men nú eftir ein mánaða í Føroyum noyðist eg at staðfesta, at hetta hendir stak ofta; at allar rásir samstundis senda andaligt tilfar.

Kundu tær ikki planlagt eitt sindur betur? Hví skulu ÚF og Rás 2 so ofta senda andaligar sendingar samstundis? Her er talan um tvær rásir. Eg meini so við, tað skuldi ikki verið serliga ringt at samskipa. Kundu tær ikki tosa saman og lagt skránna soleiðis, at lurtararnir hava møguleika at velja millum ymiskar sendingar?

Men kanska er hetta ikki bert ein spurningur um samskipan, kanska er hetta heldur ein spurningur um hugburð. Kanska er tað meiningin, at tað ikki skal vera lætt at vera syndari í Føroyum. Kanska hevur hetta okkurt at gera við, at trúarfrælsi ikki er so høgt í metum í her. Føroyar eru jú fyrst og fremst ein kristin tjóð, og Gud hjálpi tí útvarpsstjóra, sum roynir at nøkta tørvin hjá heidnum lurtarum.

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro

Sonur Finsen vitjaði í Føroyum í 1976:

# Pápi helt ikki nógv um seg sjálvan



*Haldor Finsen í Niels Finsensgøtu í Havn, sum er uppkallað eftir pápa hansara, sum varð føddur í Havn í 1860. Haldor, sum er lækni, vitjaði í Føroyum fyri fyrstu ferð í 1976 saman við konuni, Marthu*

**…men kendi sítt virði. Hetta skoðsmál gevur Haldor Finsen, sonur tann heimskenda læknan og vísindamannin, Niels R. Finsen, faðir sínum. Haldor Finsen vitjaði í Føroyum saman við konuni Marthu í august 1976, og Sosialurin hitti tey:**

### FYRI 25 ÁRUM SÍÐANI

– Hóast eg leingi havi ynskt at komið til Føroyar, har faðir mín var føddur og virkaði ein part av tíðini og gjørdi kanningar, skuldi tað ikki eynast fyrr enn nú, eg gangi á 80. ári, segði Haldor Finsen í stuttari samrøðu við Sosialin, áðrenn hann fór aftur til Danmarkar týskvøldið.

Haldor Finsen verður 80 ár 12. september. Og sunnudagin hava konan og hann gullbrúdleyp.

– Hava tit hug at fara, so gerið endiliga tað. Vit skulu rinda ferðakostnaðin, søgdu børnini hjá okkum, og sjálvandi tóku vit av. Vit hava nú verið í Føroyum í eina viku.

### Minnist ikki nógv

– Eg minnist ikki nógv til faðir mín, sum doyði, tá eg var bert átta ára gamal. Men hann kom at verða ein ógvuliga kendur maður, hvørs eyðkenni var, at hann ongantíð spardi seg sjálvan. Faðir var ótroyttiligur í virki sínum, hóast hann tey seinastu 10 árini at kalla var deyðasjúkur og viðhvørt mátti sita í koyristóli, sigur Haldor Finsen.

Niels Ryberg Finsen varð føddur í Føroyum í 1860. Faðir hansara var Hannes Steingrim Finsen, sum var fúti og seinni amtmaður. Tað var Niels R. Finsen, sum kom eftir, at ljósstrálur kunnu lekja fólk, og sum tann fyrsti í heiminum skrivaði hann ritgerð um hetta framstig í læknavísindini. Størstan týdning fekk viðgerð hansara av húðtuberkulosu. Hann byrjaði við hesum arbeiði í nøkrum barakkum á kommunusjúkrahúsinum í Keypmannahavn í 1896. Í 1901 varð ein deild skipað á Strandboulevarden í Keypmannahavn. Tað er henda deildin, sum í dag gongur undir navninum Finsens Medicinske Institut, ella bert Finsens-instituttet, sum er ein sjálveigandi stovnur.

### Orðafelli

Haldor Finsen nevnir fleiri orðafelli, sum pápi hansara plagdi at brúka.

Tað var ymiskt, sum fólk søgdu um faðir, havi eg skilt aftan á deyða hansara. Hann tók studentsprógv í Íslandi, og tað var sagt, at honum tørvaði evni og orku...?

– Hvat síðani er hent, veit eg ikki, men faðir spardi ongantíð seg sjálvan, og tað var sagt, at hansara menniskjansligu eginleikar vóru framúr. Hann helt ikki nógv um seg sjálvan, men kendi sítt virði. Eitt orðafelli, sum Finsen nýtti, var: Den lever godt, som lever skjult.

Haldor Finsen nevnir eisini dømi um, tá faðir hansara var vorðin kendur.

– Ein japanari, sum var staddur í Kina, sat og blaðaði í einari danskari bók. Tá var hann spurdur, um hann kendi nakað til Danmark ella danskt mál. Japanarin svaraði, at hann kendi einki til landið, men nøvnini H. C. Andersen og Niels R. Finsen hevði hann hoyrt um.

### Eisini lækni

Haldor Finsen minnist, tá faðir hansara fekk Nobelheiðurslønina í 1903.

– Tað var eitt ár, áðrenn hann doyði. Eg avgjørdi at verða lækni, og tað havi eg verið í næstan 50 ár, sigur hann.

Haldor Finsen hevur starvast sum lækni síðani 1925 og hevur verið í sama arbeiðsplássi í 45 ár. Eitt skifti starvaðist hann eisini á Finsens-stovninum í Keypmannahavn.



# America at War

**Fyribils metingar hjá tryggingarfeløgunum siga, at peningaligi missurin orsakað av álopunum á World Trade Center í New York og Pentagon í Washington hin 11. september, er í minsta lagi 40 milliardir USD. Roknað verður tó við, at tá liðugt er at telja upp, fer missurin at nærkast teimum 70 milliardunum. Í føroyskum pengum er hetta meira enn 560 milliardir krónur. Afturat hesum skulu leggjast øll tey virði, sum ikki vóru tryggjað, eins og tann stóri óbeinleiðis missur, ið stóðst av vanlukkuni. Tvær vikur eftir vanlukkuna gjørdi tíðindaflutningstænastan t.d. sín miss upp til 350 milliónir USD, ella 3 milliardir krónur.**

### FYRI OG EFTIR 11. SEPTEMBER

*Elin S. Winther Nataga*

Álopið hin 11. september hevur havt og hevur framvegis stóra ávirkan á gerandisdagin hjá øllum amerikumonnum, og tíðarrokningin eitur nú »before and after September 11«. Fólk eru framvegis ótrygg og bangin, tí eingin veit at siga, um fleiri álop eru í væntu. At kalla alt handilslív steðgaði upp alt fyri eitt, og handilsmenn kring landið siga frá, at sølan er minkað nógv, í summum førum niður í eina helvt. Serliga innan ferðaídnaðin stendur illa til, men sama mynstrið ger seg galdandi á øllum økjum.

Eisini her í Los Angeles merkist týðiliga, at fólk ikki nýta nógvan pening fyri tíðina. Fert tú til dømis inn á gólvið í The Beverly Center, ið er ein risastór handilsmiðstøð í Beverly Hills, er ikki nógv fólk at síggja. Vanliga er har annars sum á ólavsøku hvønn dag, gerandis sum heilagt. Eisini á nógvu matstovunum í býnum er friðarligt. Á teimum best umtóktu matstovunum var vanligt at skula bíleggja borð, men nú er ovmikið av plássi fyri teimum fáu, sum leita sær út í býin at eta.

Vanligt hevur verið, at tá eitt land er farið í kríggj, ella tá roknað verður við kríggi, eru fólk biðin um at spara, soleiðis at øll orka kann fara til herin. Øðrvísi er hesa ferð. George W. Bush, forseti, heitir staðiliga á fólkið um at nýta pening, soleiðis at samfelagið ikki skal steðga fullkomiliga upp. Fólk hava tó ilt við at gera, sum forsetin vil, og lata heldur peningin verða standandi í bankanum. Ilt er at siga, hví amerikanarar brádliga hava mist íborna hugin at »shoppa«. Summi halda orsøkina vera ta stóru óvissuna um, hvat framtíðin hevur at bjóða. Tá fólk ikki vita, hvussu endin verður á hesum krígnum, og hvat annars fer at henda, tora tey ikki at nýta pening, men royna heldur at goyma tað, tey eiga. Onnur halda - og vóna kanska - at amerikanarar hava fingið ein slíkan skelk, at teir knappliga varnast, at tilveran hevur annað at bjóða enn tað, sum keypast kann fyri dollarar.







*Framvegis verður dúgliga flaggað um alt Amerika. Sum til dømis her á parkeringsplássinum uttanfyri eina skrivstovu í Beverly Hills.*

*Mynd: Elin Winther Nagata*

### Stars and Stripes fingið come-back

Framleiðarar av amerikonskum fløggum hava tó jóladagar, tí hesi ganga sum heitt breyð. Í allari neyðini eru fólk vorðin sera tjóðskaparsinnað, og vanligt er at síggja bilar við bæði tveimum og trimum fløggum blaktrandi. Almennir bygningar eins og privat hús hava verið flaggskrýdd síðani 11. september, ta fyrstu vikuna á hálvari stong, men síðani á fullari. Flestu sjónvarpsvertir hava eisini Stars and Stripes sum bringuprýði, tá teir eru á skíggjanum.

Sambært minnisblaðnum, sum Newsweek gav út eftir vanlukkudagin, eru bíleggingar eftir fløggum tíggjufaldagar síðani 11. september. Á flaggverksmiðjuni Annin í Ohio, starvaðust 10 fólk á avskipingardeildini mánadagin 10. september. Nú eru tey fleiri enn 100, og hóast hetta er bíðitíðin eftir fløggum 8 vikur.

Ikki øll fløggini verða nýtt til at pynta hús, almennar bygningar og bilar. David Titus, avskipingarleiðari á verksmiðjuni Valley Forge Flag í Pennsylvania, sigur við Newsweek, at nú ein dagin sendi hann 500 fløgg til New York. Tey skuldu nýtast til at klæða líkkistur.

### Fíggjarligur stuðul til avvarðandi

Tryggingarfeløgini, sum veita lívstryggingar, hava avgjørt at lætta um krøvini, tá talan er um at gjalda út lívstryggingar til avvarðandi hjá teimum, sum lótu lív 11. september. Undir umstøðum sum hesum er vónleyst at fáa greiði á, um og hvussu fólk eru deyð, og tí eru krøvini til próvbyrðuna ikki eins stór og vanligt. Men ikki øll tey, sum lótu lív, høvdu teknað lívstrygging. Nógvar familjur hava mist teirra einasta forsyrgjara, og standa nú á berum. Stjórnin ætlar tó ikki at sleppa teimum uppá fjall, men hevur gjørt av at geva familjum, sum hava mist sín forsyrgjara 150.000 USD ella umleið 1 millión krónur í endurgjaldi. Harumframt hava bankar og aðrir lángevarar fryst niður húsalán og aðra skuld í nakrar mánaðir.

### Privatar innsavningar

Eitt, sum amerikumenn eru kendir fyri, eru teirra evni og hugur at skipa fyri »charities« av ymiskum slag. Og eftir 11. september hava nógv charity-tiltøk verið hildin. Beint eftir vanlukkuna skipaði ein bólkur av sokallaðum »celebrities«, sum eru kend fólk innan tónleika- og filmsheimin, fyri stórfingnari innsavning. Talan var um eina konsert, sum varð hildin samstundis í Los Angeles, New York og London, og sum varð send beinleiðis í sjónvarpinum. Konsertin varð sýnd á øllum teimum stóru sjónvarpsstøðunum, sum góvu henni ókeypis senditíð. Hetta tiltak megnaði at savna inn 150 mió. USD ella meira enn eina milliard krónur, og peningurin fór óskerdur til avvarðandi hjá teimum, sum vórðu rakt av vanlukkuni.

### America Strikes Back

Amerikanska stjórnin gjørdi, sum kunnugt, av at svara yvirgangsálopunum aftur, og byrjaði sunnudagin hin 7. oktober at bumba støð í Afghanistan, har hildið verður, at Osama bin Laden heldur til. Hendan avgerð um at fara í kríggj hevur fingið breiða undirtøku millum amerikanska fólkið. Tað vísir seg, at meira enn 80 % av fólkinum tekur undir við henni. Hóast hetta savnast fólk dagliga at mótmæla krígnum, tí nógv eru tey, sum ivast í, um krígsførsla er rætti mátin at svara yvirgangskroppum sum bin Laden aftur. Bin Laden varð herfyri spurdur um amerikanska mótálopið, og varð í amerikonskum útvarpi endurgivin fyri at hava sagt, at tað var spell, at nógv óskyldug fólk skuldu doyggja, men honum gjørdi tað einki. Hann bað amerikanarar endiliga koma eftir sær, »because I am ready to die!«